# 2. Ð Á NÁMSFERÐ Í PARÍS OG MARSEILLE

**18 næmingar í 2. Ð á Føroya Studentaskúla hava brynjað seg í 2 ár til námsferð í Fraklandi, tó ikki eins harðliga og víkingarnir fyri 1.000 árum síðan, tá teir herjaðu á París. Teir fóru á námsferð at vinna sær nýtt land og betri lívskor aðrastaðni. 2. Ð fer á námsferð at vinna sær kunnleika og førleika at bøta um lívsmøguleikarnar í egnum lívi og landi**

## Verkætlan og námsferð

Blaðið, tygum nú lesa, er partur av verkætlan í sambandi við námsferðina. 2. Ð hevur arbeitt dúgliga at fáa til vega tilfar til blaðið. Tey hava sjálv skrivað nógvar greinir og gjørt ein hóp av kanningararbeiði. Tey hava eisini havt samband við ein hóp av fyritøkum, handlum, virkjum og skúlum, sum hava stuðlað námsferðini við lýsingum. Sosialurin hevur víst ómetaliga stóra vælvild í sambandi við umbróting og prenting. 2. Ð takkar hjartaliga øllum, sum hava latið lýsingar, og sum hava hjálpt til á annan hátt.

## 120 víkingaskip leypa á París

Víkingarnir verða umrøddir soleiðis í fronskum søgubókum: "París slapp við neyð og deyð undan teirra oyðingarferðum. Víkingarnir hóttu franska ríkið. Teir róðu móti streyminum niðan eftir fronsku áunum, rændu, settu eld á, oyddu og drupu uttan afturhald. Alt mátti lúta fyri teimum. Einaferð róðu teir við sínum 120 longu og mjáu skipum niðan eftir Seineánni og steðgaðu ikki á fyrr enn mitt inni í París. Har løgdu teir seg undir býarmúrarnar kring tær báðar kendu áaroyggjarnar "Ile de la Cité ", har sjálv Notre Dame stendur í dag, og "Ile St. Louis" við Hotel de Lauzun. Tað var um reppið, at París ikki fall í víkingavald. Greivin Eudes og biskuppurin Gozlin samskipaðu verjuna, meðan víkingarnir við sínum 120 skipum royndu alt, teir kundu, at sleppa inn um múrarnar." Hetta sigst at vera størsta høvi, parísbúgvar nakrantíð hava havt at vísa sítt dirvi. Tapti París, kundu eisini allir aðrir franskir býir rokna við at falla í víkingahendur. París hevði kanska als ikki verið til í dag, um víkingarnir ikki góvust. Tað var eftir henda sigur, at París av álvara vann sær heiðursheitið " drotning býanna". París gjørdist høvuðsstaður í greivadøminum France og at enda í øllum Fraklandi.

## 2Ð í París og Marseille

2. Ð nemur á hesum sinni land ikki bara í París, men eisini í Marseille. Hesuferð koma norðbúgvarnir loftvegis og ikki eftir áunum. Hesuferð taka parís- og marseillebúgvar hjálpsamir ímóti teimum, td. rithøvundin Oumar Dia og sonur hansara Sidane, ið lesur fíggjarstýring á universiteti í París, journalisturin Dominique Courcelles á Radio France Internationale og pastorurin Philippe Perrilliat í Marseille. Hesuferð fara norðbúgvar at nema sær franska mentan og ikki at oyða hana. Teir fara at kunna seg um samfelagsviðurskifti, landafrøði, veðurlag, fólkalív, búseting, etniskar minnilutar, víndyrking, søgu, franskt mál, ítrótt o.m.a. Men teir fara eisini at umboða Føroyar og føroyska mentan, føroyskt vinnulív, føroyska ferðavinnu, føroyska frímerkjalist o.a. Teir fara at vitja skúlar, hyggja at fótbóltsdysti millum kendu liðini Olympique Marseille og Bordeaux og eta couscous á senegalesiska emigrantheiminum Faure de Vaux í París. Teir fara eisini at bjóða so mongum fransmonnum sum gjørligt til Føroya at hyggja at fyrsta landsdystinum millum londini, sum verður á Tórsvølli 8. september í ár.

## 2Ð og Nóloyar-Páll við fronskum íblástri

Tíðirnar broytast. 2. Ð fer ikki at ræna, men at nema sær vitan. Heimliga vitanin er neyðug sum støði at standa á, men altjóða íblásturin er eisini neyðugur. Tað var hann eisini á døgum Nólsoyar-Páls (1766-1808). Hans Jacob Debes skrivar: "at eggjanin til broytingar og nýskipanir mátti koma uttaneftir, var nólsoyingurin Nólsoyar-Páll eitt talandi dømi um; føroyingar heima høvdu góðtikið viðurskiftini, sum tey vóru, og kravdu ongar broytingar, heldur tvørturímóti… Nólsoyar-Páll sigst at hava verið í franskari og bretskari herflotatænastu og at hava verið skipari á einum Amerika-skipi….Nóloyar-Páll hevur møguliga verið í Fraklandi undir teirri stóru kollveltingini og í Amerika eftir uppreisturin móti Onglandi.

Um tær stóru hendingarnar úti í heiminum høvdu ávirkað hann ella ikki, so líkist Páll mest einum kollveltingarmanni, tá hann kemur heimaftur um aldaskiftið. Á mongum økjum royndi hann at fáa landsmenn sínar at ganga nýggjar leiðir." Hann hevur fingið íblástur úr Fraklandi frá monnum sum t.d. fronsku heimspekingunum Charles de Montesquieu (1689 - 1755) og Jean-Jacques Rousseau (1712 - 1778), sum løgdu lunnar undir demokratiið og fólkaræðisligu tjóðskaparrørsluna.

## 2. Ð hugsar globalt, men virkar lokalt

Vónandi koma 2.Ð og lærararnir Erik Arge og Róland í Skorini, sum verða námsleiðarar, aftur úr Fraklandi við nýggjum, kveikjandi hugsanum, sum kunnu verða teimum sjálvum til eggjan og Føroyum at gagni.

Heimkomnir skulu næmingarnir kunna um ferðina bæði við skrivligum uppgávum og munnligum framløgum.

2. Ð takkar enn einaferð hjartaliga øllum lýsarum sínum og øllum, sum stuðlað hava!

*Róland í Skorini*

**AT VELJA PRENTSMIÐJU OG TIMBURMANN ER NAKAÐ TAÐ SAMA**

Tit vilja hava fatur á ti besta handverkaranum, honum, tit kunnu hava álit á, einum meistara, ið ikki leggur eykarokning oman á eykarokning. Einum, sum kemur tann dagin, hann hevur lovað og verður liðugur tann dagin, hann hevur lovað.

Ljóðar hetta sum eitt brot burtur úr „Sagnum og ævintýrum"?

Á Hestprent smíða vit ikki hús, men vit gera alt grafiskt arbeiði.
Tað vil siga uppseting, prent og innbinding.

Tín prentlutur er í góðum hondum hjá okkum.
Hestprent gongur nú á tjúgunda ári, og eru vit vaksin til 20 starvsfólk.

Vilt tú vita meira, hava vitjan av sølumanni okkara, ella hava eitt tilboð sendandi, so eru vit altíð til dystin fús

HESTPRENT
Dvørgastígur 7
Postsmoga 3118
110 Tórshavn
Tel: 314555 • Fax: 318 026
t-post: hestoy@hestprent.fo



tann nýggi 407 verður skjótur!

Meinhardt Arge

PEUGEOT



# Norrøn gudalæra

Tann 26. mars verður givið út eitt smáark við tveimum frímerkjum, sum avmynda torugudin Tór og havgudinnuna Rán. Anker Eli Petersen hevur sniðskapað smáarkið.





Tá okkara forfedrar settust her á oyggjunum, valdu teir at leggja tingstaðin við eina lítla tvídeilta náttúruhavn miðskeiðis í landinum. Teir róptu havnina Tórshavn eftir tí mætastu fyrimyndini hjá miðaldarbóndanum - ásagudinum Tór.

Søgurnar um Tór og roysnisverk hansara eru mangar, og teirra millum er frásøgnin um, tá hann var á útróðri við risanum Hymi.



Rán var kona Ægir, hvørs navn enn verður nýtt sum kenningur fyri havið. Teir gomlu hugsaðu sær, at Rán veiddi á havinum við einum neti, sum hon nýtti til at taka teir sjólætnu.

Tað var siður, at sjómenn fyri sjóferðina annaðhvørt ofraðu ein bita av gulli ella bóru tað við sær, so at teir kundu gjalda fyri seg og sleppa inn í salin hjá Rán og Ægi, gingu teir burtur.




Les meira um Tór og Rán á
**www.tjatsi.fo**

Har finnur tú somuleiðis nógv ymiskt tilfar um norrøna gudalæru, føroyskar sagnir og kvæði.

**Postverk Føroya**

Frímerkjadeildin - 159 Tórshavn
Tlf. 34 62 00 - Fax 34 62 01
T-postur: filateli@postur.fo
Heimasíða:
**www.stamps.fo**

**Føroya Skúlabókagrunnur**
Lützenstrøð 4 • 100 Tórshavn • tel. 316100 • fax 318726 • www.fsg.fo

## Klassikarar í nýggjum búna

Í sambandi við at hundrað ár vóru liðin, síðan prosahøvundarnir William Heinesen, Heðin Brú og Martin Joensen vóru føddir, hava vit givið út hesar bøkurnar:

- **Stjørnuskaldið undir Varða (2000)**
  *eftir William Heinesen*
  – Ann Ellefsen og Kristinbjørg Høgnesen skipaðu fyri
- **Men lívið lær (2001)**
  *eftir Heðin Brú*
  – Bergljót av Skarði ritstjórnaði
- **Fiskimenn (2003)**
  *eftir Martin Joensen*
  – Ann Ellefsen og Kristinbjørg Høgnesen hava lagt til rættis

***Harumframt hava vit endurútgivið fyrsta stuttsøgusavn á føroyskum:***

- **Glámlýsi (2003)**
  *eftir Regin í Líð,* sum Kirsten Brix ritstjórnaði

*Hesar bøkurnar, ið eru gjørdar sum skúlaútgávur, eru ein fongur hjá øllum bókmentahugaðum fólki í landinum!*



Føroya Skúlabókagrunnur